

N

**» Ein atkvøða í Kunoyar kommunu hevur nógv størri ávirkan, enn ein atkvøða í Klaksvíkar kommunu**

# Nærdemokrati'ið hvørvur

**Aðrastaðni á síðuni verður greitt eitt sindur frá fíggjarstøðuni í Kunoyar kommunu, sum er nakað væl betri fyri enn mangar aðrar.**

At kommunan er so mikið væl fyri fíggjarliga, hevur uttan iva eisini gjørt sítt til, at nógv fólk ikki ynskja at leggja saman við aðrari størri kommunu, í hesum føri Klaksvíkar kommunu.

Tað er kanska so sum John Damberg sigur: – Í dag hava vit pengar á bók. Men um vit fóru saman við aðrari kommunu, so høvdu vit fingið skuld ístaðin.

Hann vísir til aðrar samanleggingar kring landið, t.d. í Sundalagnum, har fleiri kommunur hava fingið skuld at dragast við, í sambandi við avgerðina um at fara uppí eina størri kommunu.

– Ístaðin fyri at hava eina sterka eind, er hetta heldur vorðið til eina skuldarbundna eind, sigur hann avgjørdur, og slær líka so fast fast, at hann als ikki er fyri eini samanlegging við Klaksvík.

– Ein atkvøða í Kunoyar kommunu hevur nógv størri ávirkan, enn ein atkvøða í Klaksvíkar kommunu. Fara vit uppí her, so missa vit alt tað sum eitur nær-demokrati.

– Eg veit ikki, hvussu lætt tað er at fáa fatur á borgarstjóranum í Klaksvík. Mín telefon, hon svarar í øllum førum alt samdøgrið, sigur John Damberg, sum framvegis bíðar eftir avgerðini um, hvussu landsstýrið hugsar sær at kommunurnar skulu skipast í framtíðini.

## 50%

Fólkatalið í Kunoyar kommunu liggur í dag á 152 íbúgvum. Hetta er nakað minni enn um somu tíð í fjør, tá 160 fólk búðu í kommununi - 76 í Haraldssundi og 84 í Kunoy.

Hinvegin vísa hagtølini eisini eina áhugaverda gongd, at Kunoyar kommuna er hon, sum hevur havt tann størsta prosentvísa vøksturin av íbúgvum seinastu 25 árum: Soleiðis búðu bert 101 fólk her í 1985. Tað vil so aftur siga, at vøksturin hevur verið eini 50 prosent síðani tá. Tann stóri og ósvaraði spurningurin er, um bygdunum hevði verið lív lagað, um ikki tvey sera stór frambrot innan samferðsluna vóru framd: Byrgingin um Haraldssund og tunnilin til Kunoyar.

Ein eigur sjálvandi ikki at gloyma, at kommunan hevur gjørt sítt til at tey, sum ynsktu at seta búgv her, fingu møguleika til tað.

Ein kunoyingur tók í eini samrøðu við Sosialin til, at vóru hesi frambrotini ikki framd júst tá, so vóru bygdirnar minkaðar burtur í einki.

– Ja, so vóru vit í somu støðu sum t.d. Skúvoy er í ídag, segði hesin maðurin.

**TRIVNAÐUR**

*– Fólkatalið í Kunoyar kommuna er vaksið við 50 prosentum seinastu 25 árini, staðfestir borgarstjórin, John Damberg, sum her er avmyndaður frammanfyri nýggjastu sethúsini í Haraldssundi, hagar fólk fluttu inn fyri ikki so langari tíð síðani*

*Mynd: Jens Kristian Vang*